ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vesturheimurin má sleppa tí eyðmýkjandi, nýhjálandapolitiska hugsunarháttinum*
*(Hans Blix)*

# Vesturheimurin eyðmýkir Iran

**– Øll fólk, eisini iranar, hava sín stoltleika, sama um okkum dámar hann ella ikki, sigur fyrrverandi ST-vápnaeftirlitsmaðurin Hans Blix**



*- Øll fólk, eisini iranar, hava sín stoltleika, sama um okkum daámar hann ella ikki, sigur Hans Blix.*

USA og fleiri lond í Evropa eyðmýkja Iran við at krevja, at landið skal gevast við sínari kjarnorkuverkætlan, áðrenn talan kann verða um samráðingar, heldur Hans Blix, sum kemur til Føroya í mai.

Hans Blix vísir á, at tá USA og fleiri evropeisk lond løgdu eitt uppskot fyri iransku stjórnina í fjør, var einki í uppskotinum, sum veitti Iran nakra trygd. Í uppskotinum stóð heldur einki um, at USA kanska var sinnað til at endurnýggja tað diplomatiska sambandið við Iran, um landið gavst við at ríka uran.

–Tann rætta mannagongdin er at seta seg við samráðingarborðið heldur enn at siga, at hin parturin skal gera hetta og hatta, áðrenn samráðingar kunnu byrja, og at hin parturin síðani kann fáa at vita, hvat hann kann fáa burturúr, sigur fyrrverandi vápnaeftirlitsmaðurin.

- Tá fáa vit eitt vanligt orðaskifti heldur enn ta nýggju, eyðmýkjandi og hjálandapolitisku framferðina. Øll fólk hava sín stoltleika, sama um okkum dámar hann ella ikki, sigur Hans Blix við AP.

# Heimsins størsta skal sigla við evropearum

**Reiðaríið Royal Caribbean hevur gjørt av at seta heimsins største cruise-skip í sigling í Evropa**

Tað er viknandi eftirspurningur á amerikanska marknaðinum, sum hevur fingið leiðsluna í Royal Caribbean at seta "Independence of the Seas" í sigling í Evropa, tá skipið verður liðugt á finsku skipasmiðjuni í mai næsta ár.

"Independence of the Seas" er systurskip til "Freedom of the Seas". Tað fer at taka umleið 4.400 ferðafólk, og byggikostnaðurin fyri skipið er næstan fimm mia. norskar krónur.

Royal Caribbean sigur, at felagið fer at leggja seg eftir at fáa ferðafólk úr Bretlandi, Týsklandi, Italia, Fraklandi og úr teimum skandinavisku londunum. Tað ræður um at fáa fólk umborð, tí royndirnar vísa, at hvørt ferðafólk brúkar upp ímóti 400 krónum um dagin.



*"Independence of the Seas" verður systurskip til "Freedom of the Seas", sum her sæst við bryggju í Oslo í fjør.*

## STUTT SAGT

### Avmarka útlát

Guvernørarnir í fýra amerikonskum statum taka nú stig til at avmarkað CO2-útlátið. Talan er um statirnar Arizona, Kalifornia, New Mexico og Oregon, og guvernørarnir hava í fyrstu atløgu avtalað, hvussu nógv teir skulu skerja útlátið tað næsta hálva árið. Harafturat eru teir samdir um at gera eina skipan, so teir kunnu hava eftirlit við, at allir fýra statirnir halda avtaluna. Guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, sigur við AP, at avtalan er ætlað at vísa stjórnini í Washington, at teir einstøku statirnir eru til reiðar at laga seg eftir Kyoto-sáttmálanum, sjálvt um stjórnin ikki er sinnað at gera tað.

### Settu eld á bók

Í Týsklandi eru sjey ungir høgrasinnaðir menn ákærdir fyri at hava sett eld á eitt eintak av bókini "Dagbókin hjá Onnu Frank", ið lýsir umstøðurnar hjá teimum jagstraðu jødunum undir seinna heimsbardaga. Tilburðurin við bókabrenningini var í fjør og vakti stóran ans í Týsklandi, tí mong mettu hana vera niðrandi ímóti teimum mongu, sum lótu lív undir nazistisku jødatýningini. Sambært týskari lóg kunnu fólk fáa upp til fimm ára fongsul fyri at avnokta jødatýningina, men tað er ikki vist, at teir sjey menninir kunnu dømast eftir teirri lógargreinini.

### Dýrt flogfar

Ein av teimum ríku arabisku ríkisleiðarunum hevur nú bílagt sær eitt flogfar av slagnum A380, sum er 73 metrar langt, og sum vigar 280 tons. Sjálvt flogfarið kostar 1,7 mia. krónur, men keyparin hevur samstundis biðið flogverksmiðjuna broyta og umbyggja flogfarið innan fyri aðrar 850 mió. krónur. Millum annað vil hann hava einar 600 fermetrar til matstovu og skrivstovur, og alt skal gerast við einum serligum oyðimarkardámi. Franski flogsniðgevin Edésse Doret sigur, at arbeiðið fer at taka hálvtannað ár.